# Tendra træið á Vaglinum

**Leygardagin kl. 15.30 verður stóra jólatræið á Vaglinum tendrað**

JÓLATRÆ
*Jákup Mørk*

Sum vant, so verður jólatræið á Vaglinum í Havn tendra leygardagin fyri 1. sunnudag í advent.

Seinastu dagarnar hava fólk hjá kommununi pyntað um býin. Ljósperur, grannbendlar og jólastjørnur seta nú sín jóladám á gongugøtuna, og nú skuldi bert verið eftir at tendra sjálvt træið. Og tað verður gjørt kl. 15.30.

Men tað er ikki sum at siga tað, at tendra eitt so høgt og stórt træ. Tí hevur høvuðsjólamaðurin heitt á aðrar jólamenn og vættrar at vera sær til hjálpar. Stigabilurin hjá Tórshavnar Sløkkiliði, ið hevur ein 30 metrar langan stiga, og gamli brandbilurin frá 1937 eru eisini boðsendir at verða á Vaglinum, tá ið jólatræið verður tendrað.

Fyri at koma í rættan jólahýr fer Havnar Hornorkestur at spæla nøkur jólaløg.

Umframt jólamenn, vættrar og jólatónleik fara Sverri Steinhólm, prestur, og Heðin Mortensen, borgarstjóri at bera fram jólaheilsanir. Og eftir at træið er tendrað, fara Ung Sjtørnuskot at syngja á Káta Horninum.

Hini jólatrøini í kommununi: á Argjum, á Hvítanesi, á Velbastað, í Kaldbak, í Hoyvík, í Norðradali, í Syðradali, í Kollafirði, í Nólsoy og í Hesti verða tendrað næsta vikuskiftið.

**Jólagáva: Tíni bíløt í álminakkanum**

Málini á álminakkanum eru 30x42 cm. Útsligin er hann tvey tjúkk A4 ørk við einum spirali í miðjuni.

Síðsta bíleggingarfreist fyri levering áðrenn jól er 8. desembur

Áhugaður?
Fær inn á **www.jetprint.dk/fo**

Bílegg álminakkan hjá:
JetPrint ApS
T-post: álminakki@jetprint.dk
Tlf: **+45 86 98 76 66** * + porto og eksp. Kr. 92,- óansæð mongd.




JetPrint ger eisini prent- og kopiuppgávur

**Ivan Johansen Bilar søkir eftir fólki!!**

Ivan Johansen Bilar er einasta ISO góðkenda bilasøla í Føroyum – hetta setur krøv, og gevur avbjóðingar. Ásannandi at krøvini til tænastuna eru vaksandi er neyðugt við einum skjótt arbeiðandi liði. Tí verður søkt eftir:

**Goymslufólk til eykaltutagoymsluna**
Starvið er fulla tíð. Tú kemur at vera partur av einum lívligum arbeiðsumhvørvið. Goymslan umsitur allar eykalutirnir, í høvuðsheitum til bilmerkini vit selja: Citroén, Mitsubishi, Mercedes Benz og Daimler Chrysler. Mangan er ferð á, og tú vil taka eitt tak tá tørvur er á tí.
Løn samb. royndum og førleika.

**Lærlingi til eykalutagoymsluna**
Eitt lærupláss í einum umhvørvið sum er mennandi og avbjóðandi. Vit fáa vøru hvørja viku og helst fleiri ferðir um vikuna. Rætti persónurin hevur arbeiðsvilja og er til dystin fús at læra nakað nýtt hvønn dag.
Løn samb. galdandi lærlingasáttmála.

Meira fæst at vita við at venda sær til, Jógvan T. Joensen á 31 36 66 ella jogvan@ivan.fo
Ríð ikki sjóvarfallið av tær – send eina umsókn við viðkomandi skjølum til:

Ivan Johansen Bilar
Postrúm 3205
FO – 110 Tórshavn

Stílað: Jógvan T. Joensen

CITROËN DaimlerChrysler MITSUBISHI www.ivan.fo
Ivan Johansen Bilar

Sosialurin 341800

# Bæði til heila og góma

**Hósdagin kl. 14.00 letur upp nýggjur bóka- og kryddhandil í Niels Finsensgøtu 33 í Havn. Nýggi handilin heldur til í gamlari krambúð, sum hevur staðið órørd síðan hon stongdi í 1942**

NÝGGJUR HANDIL
*tíðindaskriv*



*Lisa Hendriksdóttir letur upp nýggja bóka- og kryddkrambúð í Niels Finsensgøtu 33 í Havn. Her er hon avmyndað uttan fyri hølini.*

*Mynd: Magnus Magnussen*

Longu í 1942 høvdu hjúnini, Johanna og Jóhan Hendrik Rubeksen, handil í hølunum í Niels Finsensgøtu 33. Krambúðin nevndin Kina-Japan, men tá ohanna brádliga doyði, lat handilin aftur.

**Bøkur og krydd**

Nú krambúðin letur uppaftur, hevur hon broytt navn. Handilin eitur nú "Bókabúðin Bjalla" - við undirheitinum "-krydd og krás". Og navnið á krambúðini kann takast bókstaviliga. Á hillunum eru føroyskar og danskar bøkur. Og bøkur eru sum kunnugt krydd og krás fyri likam og sál.

Men eisini undirheitið "krydd og krás" kann takast bókstaviliga. Á søluhillunum standa nevniliga eisini orientalskar matvørur. Talan er millum mangt annað um alskins orientalskar kryddvørur, fiskasósir, turkað frukt, mandlur, úrvalsris o.s.fr. Í fyrsta umfari er serliga talan um teilendskar, indiskar og pakistanskar vørur. Seinni verður úrvalið víðkað til vørur úr mongum londum aftrat.

Lisa Hendriksdóttir, sum rekur handilin, er útbúgvin lærari. Hon hevur starvast sum lærari í 15 ár, bæði í Danmark, Grønlandi og Føroyum. Hon hevur havt stóran áhuga fyri bókasavnsarbeiði, og tí fellir tað henni náttúrligt at fylla part av krambúðarhillunum við bókum. Kreativa lyndið og hegnið hevur so eisini víst seg í sera spennandi matgerð hennara, og tískil er kombinasjónin av bókum og orientalskum matvørum, hóast óvanlig, í hennara føri heilt náttúrlig.

Øll árini, síðan hon var ung, hevur Lisa Hendriksdóttir fingist við okkurt slag av handli við síðuna av lestri og seinni lærarastarvi. Men við Bókabúðini Bjallu fer Lisa nú undir handilsvirksemi burturav.

Nýggi handilin letur upp hósdagin kl. 14.00. Í hesum sambandi fer Ólavur Rasmussen, prestur og rithøvundur at signera bókina um Kierkegaard, Antin ella. Ólavur Rasmussen signerar millum kl. 15.00 og 16.00 upplatingardagin.

Fólk, sum støkka inn á gólvið hendan dagin, fáa gløgg og kleynur.

# Nýggj skaldsøga

**Í komandi viku kemur eftir ætlan út nýggj skaldsøga eftir Absalon Absalonsen nevnd "Sornhúsfólkini"**

Hetta er framhald av skaldsøguni "Hjálpt úr neyð", ið kom út undan jólum í fjør.

Tað er forlagið "Løkur Lítli", ið gevur bókina út.

Skaldsøgan er uml. 240 blaðsíður. Hon verður prentað á "Einars Prent" og í bókabúðunum kemur hon at kosta 240 kr.

Tey, ið hava lisið handritið, geva henni sera gott ummæli, til dømis hesi:

**SORNHÚSFÓLKINI**

Einaferð enn sýnir Absalon sjáldsomu evnir síni at skriva forvitnisligar, huggrípandi og spennandi skaldsøgur. Eins og í fyrru bókini "Hjálpt úr neyð", sum kom út í fjør, lýsir hann viðurskifti føroyinga fyri 100-200 árum síðani, árini fyri og eftir fríhandilin og fram til slupptíðina, sum tók seg upp um aldaskifti 18/1900. Í hesum sambandi skrivar hann um føroyingar, sum sigldu við hetlendskum og enskum skipum, og um broytingar, sum fóru fram í samfelagnum og veiðuhættum teirra, alt til føroyingar fóru undir at keypa sær skip sjálvir. Serliga livandi og spennandi lýsir hann hættisligu trolingina við enskum seglskipum við eysturstrond Onglands, har føroyingar vóru við.

Høvundurin lýsir á skakandi hátt fyri okkum, hvussu drykkjuskapurin í Føroyum um hetta mundið armaði út húski og menn, sum seldu jørð fyri brennivín, men hvussu hjálpsemi, áræði, dugnaskapur og gudstrúgv lyfti teir burtur úr aftur armóðini. Tú kennir aftur søguligar hendingar og ónavngivnar persónar, sum í eftirtíðini fingu stóran týdning, bæði í vinnuliga og átrúnaliga lívinum í Føroyum.

*Z.Zachariassen.*

**(Um Sornhúsfólkini)**

Hann hevur livað seg inn í viðurskiftini ávíst tíðarskeið í Føroya søgu og gjørt tað so væl, at persónarnir í skaldsøguni eru allýstir fyri eygunum á nútíðar menniskjanum á ein tílíkan hátt, at bókin er sera spennandi og persónliga viðkomandi. Tú sleppur ikki undan at vera við í hendingunum. Eitt stak gott framhald av fyrru bókini.

*Heri Tróndheim.*

Tað er sera áhugavert at lesa »*Sornhúsfólkini*.«
Bókin er væl skrivað, áhugaverd og søguligt ískoyti til eina stóra broytingartíð, sum ikki er lýst á henda hátt áður.

*Rodmundur í Liða.*